# HEILSU- OG INNLENDISMÁLARÁÐIÐ

**Løgtingið**

Dagfesting: 10. januar 2018
Mál nr.: 17/0079-1
Málsviðgjørt: KG

**Løgtingsmál nr. xx/201x: Uppskot til løgtingslóg um at umbyggja og umvæla Klaksvíkar sjúkrahús**

**Uppskot til**

**Løgtingslóg
um
at umbyggja og umvæla Klaksvíkar sjúkrahús**

**§ 1.** Landsstýrismanninum verður heimilað at gera avtalur um at umbyggja og umvæla Klaksvíkar sjúkrahús, so ein heilsumiðstøð verður staðsett har. Útreiðslurnar til verkætlanina kunnu í mesta lagi vera 15 mió. kr.

**§ 2.** Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd, og fer úr gildi 31. desember 2019.

## Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

### 1.1. Orsøkir til uppskotið

Á løgtingsinsfíggjarlógini fyri 2018 eru 15 mió. kr. játtaðar til hølisumvælingar á Klaksvíkar sjúkrahúsi javnt býttar millum 2018 og 2019, hetta soleiðis, at ein heilsumiðstøð verður staðsett har.

Við at skipa eina heilsumiðstøð á Klaksvíkar sjúkrahúsi ber til at savna tilboðini um heilsutænastur, t.v.s. kanningar og viðgerðir, á einum staði. Harvið fer at bera til at veita borgarum í Norðoyggjum eina munandi betri heilsutænastu, enn møguleiki er fyri undir verandi skipan.

Við tíðini er ætlanin, at ein stórur partur av ambulantum viðgerðum, og viðgerðum til borgarar við varandi sjúkum og eldri, kann fara fram á heilsumiðstøðini. Á heilsumiðstøðini er ætlanin at viðkomandi heilsustarvsfólk fara at starvast har, t.v.s. kommunulæknar, sjúkrarøktarfrøðingar, heilsufrøðingur, farmaseutur, kostráðgevi, sálarfrøðingar o.s.fr. Ætlanin er, at tað verður høgligari fyri borgaran, at heilsutænasturnar verða savnaðar á einum staði.

Ein fortreyt fyri at kunna fremja ætlanina við eini heilsumiðstøð á Klaksvíkar sjúkrahúsi í verki er, at neyðug hølir eru til taks. Ítøkiliga er ætlanin, at ein hædd á Klaksvíkar sjúkrahúsi, t.v.s. Niðristova, verður umbygd, og gerst kjarnin í heilsumiðstøðini. Á hesi hæddini er pláss fyri kommunulæknum, viðtalustarvsfólkum annars umframt øðrum heilsustarvsfólkum.

Á somu hæddini, sum heilsumiðstøðin eftir ætlan skal vera á, eru eisini onnur hølir, sum heilsumiðstøðin kann brúka, tá tørvur er á tí. Nevnast kunnu ein nýinnrætta ambulatoriudeild, skaðastova og røntgen. Hølini hjá rannsóknarstovuni og fysio/ergoterapi liggja nærhendis heilsumiðstøðini. Harumframt fær heilsumiðstøðin atgongd til aðrar tænastur og onnur høli, t.d. fundarhøli, matstovu/kantinu, bíðirúm og toilett, ið eru tøk at brúka saman við sjúkrahúsinum.

Í komandi tingsetu er ætlanin at leggja fyri Løgtingið eitt lógaruppskot um at skipa eina heilsumiðstøð í Norðoyggjum. Harumframt fara kommunustýrini í Norðoyggjum og landsstýriskvinnan at gera eina samstarvsavtalu um at skipa eina heilsumiðstøð í økinum við tí endamáli at betra heilsutænasturnar til borgarar í Norðoyggjum.

### 1.2. Galdandi lóggáva

Ongin lóg er á økinum.

### 1.3. Endamálið við uppskotinum

Endamálið við lógaruppskotinum er, at útvega landsstýrismanninum heimild til at gera avtalur um at umbyggja og umvæla Klaksvíkar sjúkrahús, so farast kann undir arbeiðið at skipa eina heilsumiðstøð, sum verður staðsett á Klaksvíkar sjúkrahúsi.

### 1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum

Við lógaruppskotinum ber til at fara undir arbeiðið at umbyggja og umvæla Klaksvíkar sjúkrahús, so farast kann undir arbeiðið at skipa eina heilsumiðstøð, sum verður staðsett á Klaksvíkar sjúkrahúsi.

**1.5. Ummæli og ummælisskjal**

Lógaruppskotið varð sent til ummælis hjá Fíggjarmálaráðnum, Klaksvíkar sjúkrahúsi, Heilsutrygd, Landsapotekaranum, Kommunufelagnum, Klaksvíkar kommunu, Fugloyar kommunu, Hvannasunds kommunu, Kunoyar kommunu, Viðareiðis kommunu, Kommunulæknafelag Føroya, Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar, Felagið Føroyskir Sálarfrøðingar, Fysioterapeutfelag Føroya, Ergoterapeutfelagið, Kost- og føðslufelagið, Bioanalytikarafelagið og Sjúklingaráðið

**Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum**

**2.1. Fíggjarligar avleiðingarnar fyri land og kommunur**
Játtaðar eru 7,5 mió. kr. í løgtingsfíggjarlógini fyri 2018, umframt at 7,5 eru settar í ætlanartølini fyri 2019. Hetta merkir, at 15 mió. kr. eru ætlaðar til umvælingar og umbyggingar á Klaksvíkar sjúkrahúsi í 2018 og 2019. Henda játtan verður brúkt til at umbyggja og umvæla Klaksvíkar sjúkrahús, so farast kann undir arbeiðið at skipa eina heilsumiðstøð, sum verður staðsett á Klaksvíkar sjúkrahúsi. Av tí, at bygginevndin ikki er sett og arbeiðið tískil ikki er farið í gongd, ber ikki til at geva eina ítøkiliga frágreiðing um hesa løguverkætlan í løtuni.

Hetta lógaruppskotið hevur ikki við sær fíggjarligar avleiðingar fyri kommunurnar í Norðoyggjum. Men tá ið virksemi byrjar á heilsumiðstøðini á Klaksvíkar sjúkrahúsi, fer hetta at hava við sær fíggjarliga avleiðingar fyri kommunurnar. Tað er tó ov tíðliga at siga, hvørjar tær fíggjarligu avleiðingarnar av hesum fara at verða fyri kommunurnar.

**2.2. Umsitingaligar avleiðingar fyri land og kommunur**
Við heimild í ásettu samlaðu løguupphæddini í verklagslógini, kann landsstýrismaðurin gera avtalur, sum hava við sær byggiútreiðslur í komandi fíggjarárum, um so er, at hetta er neyðugt fyri at gera skynsamar sáttmálar við atliti at valda útbjóðingar- og byggiháttinum, og treytað av, at tann samlaða løguupphæddin verður hildin. Umframt at við átekning kann heimild verða givin at flyta óbrúktar løgujáttanir til seinni fíggjarár

Umsitingarliga fer lógin at gera tað møguligt hjá landinum at gera bindandi avtalur fyri komandi fíggjarár, har krøvini til játtan eru kend frammanundan. Tað fæst tískil ein størri trygd fyri, at framhaldandi arbeiði at umvæla og umbyggja Klaksvíkar sjúkrahús, ikki steðgar upp.

Hetta lógaruppskotið hevur ikki við sær umsitingarligar avleiðingar fyri kommunurnar í Norðoyggjum. Men tá ið virksemi byrjar á heilsumiðstøðini á Klaksvíkar sjúkrahúsi, fer hetta at hava við sær umsitingarligar avleiðingar fyri kommunurnar. Tað er tó ov tíðliga at siga, hvørjar tær umsitingarligu avleiðingarnar av hesum fara at verða fyri kommunurnar.

**2.3. Avleiðingar fyri vinnuna**
Lógaruppskotið hevur við sær økt virksemi fyri byggivinnuna.

**2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið**
Lógaruppskotið hevur ikki við sær avleiðingar fyri umhvørvið.

**2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum**
Lógaruppskotið hevur ikki við sær avleiðingar fyri Norðoyggjar. Tá ið heilsumiðstøðin verður tikin í nýtslu er ætlanin, at broytta skipanin fer at hava við sær jaligar avleiðingar fyri borgarar í Norðoyggjum, sum bæði fara at fáa tilboð um støðugt fleiri heilsutænastur á Klaksvíkar sjúkrahúsi, og hesar kunnu veitast nærhendis borgaranum.

**2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir**
Lógaruppskotið hevur ikki við sær avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir. Tá ið heilsumiðstøðin verður tikin í nýtslu er ætlanin, at broytta skipanin fer at hava við sær jaligar avleiðingar fyri borgarar í Norðoyggjum, sum bæði fara at fáa tilboð um støðugt fleiri heilsutænastur á Klaksvíkar sjúkrahúsi, og hesar kunnu veitast nærhendis borgaranum.

**2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum**
Tað eru ikki millumtjóðasáttmálar á økinum, ið lógaruppskotið fevnir um, og sum Føroyar hava skyldu at fylgja.

**2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar**
Lógaruppskotið er ikki fevnt av tvørgangandi millumtjóðasáttmálum. Av somu orsøk eru ásetingarnar í "Anordning nr. 136 af 25. februar 2000 om ikrafttræden for Færøerne af lov om den europæiske menneskerettighedskonvention" og "Bekendtgørelse nr. 35 af 15. september 2006 om rettigheder for personer med handicap" ikki viðkomandi fyri lógaruppskotið.

**2.9. Marknaforðingar**
Lógaruppskotið fevnir um viðurskifti í Føroyum. Av somu orsøk eru ongar ásetingar í lógaruppskotinum viðvíkjandi marknaforðingum millum lond.

**2.10. Revsing, útpanting, sektir ella onnur størri inntriv**
Lógaruppskotið fevnir ikki um revsing, útpanting, sektir ella onnur størri inntriv í rættindi hjá fólki.

**2.11. Skattir og avgjøld**
Lógaruppskotið fevnir ikki um skattir og avgjøld.

**2.12. Gjøld**
Lógaruppskotið hevur ikki við sær ásetingar um gjøld.

**2.13. Áleggur lógaruppskotið fólki skyldur**
Lógaruppskotið áleggur ikki fólki skyldur.

**2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein annan enn landsstýrismannin ella til kommunur**
Lógaruppskotið heimilar landsstýrismanninum at gera avtalur um at umbyggja og umvæla Klaksvíkar sjúkrahús. Heimildin er tó treyta av, at útreiðslurnar hesum viðvíkjandi í mesta lagi kunnu vera 15 mió. kr. Lógaruppskotið fevnir ikki um møguleikan at kæra avgerðir til hægri fyrisitingarligan myndugleika.

**2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn**
Lógaruppskotið fevnir ikki um atgongd hjá almennum til privata ogn.

**2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar**
Lógaruppskotið hevur ikki við sær aðrar avleiðingar enn tær, sum eru nevndar omanfyri.

## 2.17. Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum

| | Fyri landið ella landsmyndug-leikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss ella øki í landinum | Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Nei | Ja |
| Umsitingarligar avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Sosialar avleiðingar | | | Nei | Nei | |

**Kapittul 3. Serligar viðmerkingar**

**3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greina**

**Til § 1**
Landsstýrismanninum fær við lógaruppskotinum heimild til at gera avtalur um at umbyggja og umvæla Klaksvíkar sjúkrahús við í mesta lagi 15 mió. kr., so ein heilumiðstøð verður staðsett har.

**Til § 2**
Gildiskomuáseting. Løgtingslógin kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd, og fer úr gildi 31. desember 2019.

Heilsu- og innlendismálaráðið, dagfesting.

**Sirið Stenberg**
landsstýrismaður

/ Turid Arge

**Yvirlit yvir fylgiskjøl:**
Fylgiskjal 1: